# Norðsjóvarsøvnini fund í Føroyum

**Um vikuskiftið høvdu Norðsjóvarsøvnini fund í Føroyum**

ALTJÓÐA SAMSTARV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Og um vikuskiftið høvdu Norðsjóvarsøvnini arbeiðsfund í Føroyum.

Fyri tveimum árum síðan vóru Føroya Fornminnissavn og Tórshavnar Býarsavn boðin upp í felagsskapin hjá sjóvinnusøvninunum kring Norðsjógvin,

Talan er um søvn í bæði Skotlandi, Onglandi, Fraklandi, Belgia, Niðurlondum, Danmark, Týsklandi, Svøríki og Noregi og fleiri av teimum teljast millum fremstu sjóvinnusøvn í heiminum.

Á fundinum í Føroyum varð samráðst um felags framsýningarog útgávutiltøk, um at menna samstarvið og um strategiina hjá felagsskapinum á fundi hjá felagsskapinum í alheims savnsfelagsskapinum ICMM (International Congress of Maritime Museums).

Eisini varð kunnað og kjakast um viðurskifti og umstøður hjá hvørjum øðrum.

Sunnudagin hevði Tórshavnar kommuna bjóðað á útferð við sluppini Westward Ho, sum nýliga er umvæld og sum føroysku fornminnamyndugleikarnir hava góðkent sum varðveitingarvert skip.

Útferðin bar kortini ikki til, tí veðrið varð so vánaligt. Ístaðin varð farið við bussi norður eftir. Millum annað varð vitjað á hvalastøðini við Áir, sum er ein av teimum síðstu hvalastøðunum í heiminum, sum enn er til skjals. Seinasti hvalabáturin á støðini, Heykur, er eisini varðveittur. Hann er í varðveitslu hjá Deutsches Schiff-artsmuseum og eitur nú Rau 9.

Sambondini, ið Fornminnissavnið og Býarsavnið hava fingið við tey evropisku sjóvinnusøvnini ger, at vit kunnu fáa góð faklig ráð frá fremstu serfrøðingum í heiminum á hesum øki og innlit í, hvussu gjørt verður aðrastaðni, siga Býarsavnið og Fornminnissavnið.

- Tað, ið útlendsku savnsfólkini sóu á ferðini í Føroyum, gjørdu tey ikki sørt bilsin. Umhvørvið við Vestaruvág í Havn, Føroya Fiskavirking – gamla Bacalao, Skipasmiðjan, Müllers pakkhús, Skeiva pakkhús hjá Lützen og sluppin Westward Ho, hildu tey kundu verða karmur um okkurt stórt og serstakt, fyri ikki at tala um gomlu hvalastøðina við Áir.

Meiri fæst at vita á www.northseanetwork.com

# Norðoyastevnan stak friðarlig

**Á løgreglustøðini í Klaksvík lata tey væl at Norðoyastevnuni. Nógv fólk hava verið saman, og flest øll hava skikkað sær væl: - Nakrir bardagar hava tó verið á skránni, og nøkur full fólk hava gjørt vart við seg, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.**



*Klokkan eitt leygarnáttina fór ein bilur við tveimum fólkum av vegnum við Árnafjarðartunnilin. Eingin fólkaskaði stóðst av hendingini, men bilførarin verður væntandi skuldsettur fyri at koyra við kenning og ongum koyrikorti.*

LØGREGLUTÍÐINDI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Klokkan eitt leygarnáttina fór ein bilur við tveimum fólkum av vegnum við Árnafjarðartunnilin. Eingin fólkaskaði stóðst av hendingini, men bilførarin verður væntandi skuldsettur fyri at koyra við kenning og ongum koyrikorti.

Annars var leygarnáttin rættiliga friðarligt í Klaksvík:

- Vit vórðu boðsendir nakrar ferðir – nakrir bardagar vóru á skránni, og tríggir mans fóru á skaðastovuna við smávegis snuddum, sigur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík.

Sunnunáttin var somuleiðis eyðkend av friði. Smávegis herverk var framt á ein bil, og nakr-ar fráboðanir um ov full fólk vóru. Men klokkan 2.45 varð ein maður sligin niður og koyrdur á skaðastovuna. Hálvan tíma seinni varð gerningsmaðurin funnin.

So sum heild hevur norðoyastevnan verið friðarlig:

- Vit hava sjálvandi havt meira at gjørt enn til eitt vanligt vikuskifti, men eg haldi, stevnurnar eru friðarligari nú enn fyri 15-20 árum síðani. Eitt nú hevur eingin húsófriður verið fráboðaður, og bert ein maður hevur sovið rús av í brummuni. Tey sum hava havt kenning, hava klárað seg avbera væl, leggur vakthavandi á løgreglustøðini í Klaksvík at enda afturat.

## Gjørdu seg til at leita eftir rennarum

Seinnapartin leygardagin gjørdi løgreglan í Havn seg til at fara í hagan at leita eftir tveimum monnum.

Teir vóru við í eini kapping í at renna úr Kvívík til Havnar, men tá ið tað dró út, at teir komu fram, fóru onnur, sum vóru við, at stúra og ringdi til løgregluna.

Løgreglan mannaði seg út og fekk leitingarhundar á støðina, men áðrenn farið var avstað, komu boðini um, at rennararnir tíbetur vóru komnir aftur í øllum góðum, og so var tann leitingin avblást.

Tað vísti seg, at teir høvdu havt torført við at finna tveir av postunum, og tí hevði tað drigið út.

Løgreglan í Havn hevur eisini tikið tveir mans fyri at rúsdrekkakoyring og tað, sum tað plagar at vera eitt vikuskifti.

# Innbrot í føroysku kirkjuna í Keypmannahavn

**Stjólu pening, sum varð ætlaður til vælgerðandi endamál**

INNBROT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Náttina ímillum Kristi Himmalsferðardag og fríggjadagin hava tjóvar brotið seg inn í kirkjuna við miklum harðskapi.

Hóast Samuelskirkjan er væl vard við høgum múrum, brandhurðum, og projektørum, ið tendra av sær sjálvum, um okkurt rørir seg, hava tjóvarnir kortini megnað at bróta seg inn í kirkjuna.

- Mangt bendir á, at teir vistu hvørjum, teir leitaðu eftir og hvar teir skuldu leita, tí brandtryggjaða skap-ið á deknaskrivstovuni er brotið upp, sigur Bergur Jacobsen, Prestur

Hann sigur, at úr skápinum hava tjóvarnir stolið pening, sum var savnaður inn til ymisk vælgerðandi endamál. Peningur, sum er innsavnaður hesar seinastu 10 dagarnar, varð eisini stolin.

Tjóvarnir hava eisini brotið inn á skrivstovuna hjá sóknarmeðhjálparanum, ið stendur fyri stórum parti av vælgerðandi arbeiðinum í Samuels Sókn, og har hava teir tikið peningin, hon hevur til hetta arbeiðið.

Prestur sigur, at talan er um einar 10.000-15.000 krónur, sum eru stolnar.

- Somuleiðis tjóvarnir kunna fingið sær ókeypis hýruvogn heimaftur, tí allar "taxabongirnar", ið verða nýttar til at flyta eldri og ófullfør fólk til og úr kirkju, eru eisini stolnar.

Men kirkjusilvurið hava teir ikki rørt, tað loysir seg ikki at stjala, tí tað sleppst ikki av aftur við tað.

Í Samuelskirkjuni eru eisini teldur, sum eru vanligt tjóvagóðs, men heldur ikki tær vórðu stolnar.

- Helst hava tjóvarnir vitað, at tær kunnu ikki slejast aftur, tí tær eru á Kirkjunetinum, sum er eitt net fyri seg sjálvan og kunnu tí ikki brúkast til nakað annað, sigur prestur.



*Føroyska kirkjan í Keypmannahavn, Samuelskirkjan, hevur havt ótýdligar gestir og teir hava stolið peningin, sum ætlanin var at gera vælgerðandi arbeiði fyri*

Eisini tað styrkir um illgrunan um, at tjóvarnir vóru staðkendir.

Løgreglan hevur sagt teimum, at møguleikin at finna tjóvarnir, eru bara 2%.

Samuelskirkjan hevur ikki tjóvariáváring, tí tað eru so nógvir f elagsskapir, sum brúka kirkjuna og vandi fyri, at áváringin fer í gongd uttan orsøk, er stórur og tað kostar eina bót.

- Men nú mugu vit fáa okkum tjóvariáváring, leggur prestur afturat.

Hann sigur, at hóast herverk er framt fyri at fáa fatur á peninginum, hevur sjálvt kirkjurúmið hevur fingið frið, og tí halda guðstænasturnar fram, sum vanligt.

Í eini kirkju í grannalagnum, Kingo kirkjuni, hava tjóvar eisini brotið seg inn, men har hava teir kortini onki tikið – helst tí okkurt hevur órógvað teir, sigur Bergur Jacobsen.